## NM-silvur til Herborg

Herborg Hansen, úr Klaksvík, endaði á deildum 1. plássi í NM í talvi fyri gentur, sum telvað er í vikuskiftinum í Stokholm. Tíverri rakk frálíka úrsliti bert til Silvur, tí útrokningarnar vóru til fyrimuns til Katrine Tjølsen, úr Noregi, sum harvið vann NM-gull. Undan 5. og seinasta umfarinum seinnapartin, var Herborg á odda við ½ stigi. Men tá talvið endaði javnt, kom Katrine Tjølsen, sum Herborg annars sigraði fyrr í kappingini, uppá sama stigatal. Spell ! Men tað sum stendur eftir er, at talan hevur verið um eitt einastandandi flott avrik hjá Herborg, sum telvdi kappingina uttan tap, hóast flestu mótstøðugenturnar - á pappírinum - vóru sterkari enn Herborg.



## Bragd hjá AGF

Púrasta óvæntað vann AGF í gjár 1-0 á FCK í donsku superliguni í fótbólti. Einsamalla málið í dystinum skeyt Ole Budtz eftir 86 minuttum, og tað undirstrikaði framúr dagin hjá AGF, sum eisini kundi takka einum framúr væl spælandi Steffen Rasmussen í málinum fyri sigurin. FCK og Brønby eru jøvn á odda við 55 stigum í part. OB, sum hevur havt góðan byrð seinastu vikurnar, er nú komið upp á 53 stig.

## Hugsið fór ólukkan størri



**Alt gott um, at sjálvboðin nú gera ein 50 metra venjingarhyl til Pál Joensen. Men enn eina ferð undirstrikar hetta konstantu hovsa-loysnirnar, sum hava eyðkent ein vantandi føroyskan ítróttarpolitikk**

ÍTRÓTTARKLUMMAN

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skulu vit halda oyggjaleikir? So mugu vit gera eina rennibreyt, og tá toftamenn vilja, so lat teir gera hana.

Altjóða fótbóltsdystir? Tað vildu toftamenn fegnir eisini standa fyri, so vit sluppu frá at hugsa um restina. Og tá Havnin so eisini vildi upp í part, fingu vit tveir grasvøllir.

Vit vilja hava umstøður til ítrótt. Størsta kommunan í landinum hevur seinnu árini lagt stórar upphæddir í útbygging av ítróttarfasilitetum, men eins og tey bæði nevndu dømini, so er talan aftur um hovsa-loysnir. Fimleikahallir verða nú bygdar. Rennibreyt er gjørd og Badminton-høllin er keypt. Ein venjingarhøll varð mest sum spard eftir reyv í Hoyvík, har fólk royndu at stúgva seg inn til fyrsta meistaraheitið hjá H71, og nú skal ein lappaloysn gerast í høllini á Hálsi, sum hóast mest sum alt verður gjørt av nýggjum, framvegis ikki kemur at standa altjóða mát.

Alt gott um, at Tórshavnar Kommuna roynir at betra um útboðið av fasilitetum til sínar borgarar, men í nógvar mátar verður hetta ikki meira enn næstbest. Fyrst og fremst tí talan støðugt er um at betra og útbyggja verandi fasilitetir, heldur enn at hugsa av nýggjum – og at hugsa stórt.

Samstunds frættist úr Vági, at har hava tey – skilliga – mist vónina um, at land ella kommuna nakran tíð ger álvara av tosinum um 50 metra hyl, og tí verður nú farið undir eitt projekt, har tey fyri fimm milliónir kunnu skapa ein venjingarhyl til fremsta svimjara okkara.

Men fimm milliónir eru altso óluksáliga nógvir pengar at brúka til ein einstakan ítróttarmann – eisini hóast onnur vónandi fáa gleði av hylinum.

Tað er neyðugt, at land og kommunur saman við ÍSF kanna eftir, hvussu vit best møguliga kunnu skapa eitt verulig ítróttarumhvørvi fyri fremstu ítróttarfólk okkara. Beint nú hava vit ein framúr svimjara, men hvat so við degnum, tá vit hava ein framúr curling-spælara? Skulu vit tá byggja eina heila breyt júst til tann persónin?

Sjálvandi eiga stórir ítróttardeplar at byggjast kring landið. Fyrst og fremst í Havn, har størsti parturin av fólkinum býr. Seinastu 6-8 árini eru ovurstórar milliónaupphæddir nýttar at betra og lappa um verandi anlegg, heldur enn at hugsa nýtt. Tað, sum er nýtt higartil, hevði helst munað heilt væl í einum ordiligum projekti, har allur Gundadalur – frá Svimji- til Badmintonhøllina – varð gjørdur til eitt kompleks við 50 metra hyli, fitness-depli, altjóða ítróttarhøll – you name it. Tá kundu vit skapt eitt veruligt elitumiljø, har fremstu ítróttarfólk okkara kundu ment seg og samstundis drigið onnur við sær.

Og tað er hvørki ein sjálvboðin uppgáva ella ein kommuna uppgáva. Talan er um landsuppgávu, sum myndugleikarnir mugu fáa eyguni upp fyri. Alt tos um politikk innan úrvals-ítrótt eru bara tóm orð, so leingi sum karmar ikki verða skaptir til hetta.



*Annika Vang skeyt leygardagin føroyskt met á øllum frástøðum og tilsamans. Samstundis, sum hon fekk fleiri stig enn Oyggjaleikametið*

# Kunnu vinna fleiri gullmerki á Álandi

**Leygardag var næsta úttøkukappingin í bogaskjóting til Oyggjaleikirnar, og bæði Annika Vang og Absalon Hansen settu nýggj føroysk met, har tað hjá Anniku er hægri enn Oyggjaleikametið. Absalon fekk somuleiðis fleiri stig enn vinnarin av Oyggjaleikunum seinast**

BOGASKJÓTING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Annika Vang setti nýtt føroyskt met á øllum frástøðum. Á 70 metrum fekk hon 271 stig, sum eru 13 stig fleiri enn gamla metið. Á 60 metrum fekk hon 290 stig, sum eru 14 stig fleiri enn gamla metið. Á 50 metrum fekk hon 284 stig. Tað eru 25 stig fleiri enn gamla metið, og 9 stig fleiri enn Oggjaleikametið. Á stytstu frástøðuni – 30 metrar – fekk Annika Vang 333 stig, og tað er 6 stig omanfyri Oggjaleikametið og 18 stig fleiri enn gamla føroyska metið.

Tilsamans gav hetta Anniku 1178 stig, og tað eru 6 stig fleiri enn Oyggjaleikametið, ið varð sett av Gail Reilly av Man í 2003.

Gamla føroyska metið var 1095 stig, sum Annika skeyt á Oyggjaleikunum á Rhodos í 2007.

Gomlu føroysku frástøðumetini átti Annika Vang eisini. Tó er 60 metrurin undantikin, tað metið átti Annlott Rasmussen.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at 20 ára gamla Annika Vang hevur skotið bogaskjóting í 15 ár.

### Sterkt landslið

Somuleiðis skeyt Absalon Hansen nýtt føroyskt met leygardagin, tá hann skeyt seg til 1192 stig. Hetta er 1 stig meira, enn gamla metið, ið hevur staðið líka síðan 1998, tá Poul Martin Hansen fekk 1191 stig.

1192 er somuleiðis meira, enn hvat nakar megnaði at skjóta á Rhodos í 2007, tá besti skjúttin fekk 1169 stig.

Harumframt fingu seks skjúttar leygardagin persónlig met.

Tí sær út til, at Oyggjaleikaliðið hjá Føroyum, sum fer til Álands er rættiliga sterkt. Í recurve, sum Annika Vang og Absalon Hansen skjóta, sær liðið sterkari út enn nakrantíð, um Annika og Absalon halda fram við somu taktum, og ein skjútti afturat – eftir øllum at døma Hans Petur Højgaard, sum hevur verið best av restini higartil – megnar at koma eitt sindur longur upp í stigum.

Tað eru tríggir teir bestu skjúttarnir. Tveir menn og ein kvinna, ið luttaka aktivt í liðskjóting.

Í Compound hava Føroyar altíð verið sterkar á Oyggjaleikum, har serliga Schandorff Vang, Per H. Andersen, Sigrid Vang, Albert Dam og seinastu árini eisini Jógvan Niclasen hava vunnið nógv heiðursmerki.

Í ár er tó líkt til, at onkrir av ungu skjúttunum – fleiri eru um boðið – sleppa framat.

Hetta er bæði tí, at Schandorff Vang hevur tikið avgerð um at gevast á Oyggjaleikum, og tí ungu skjúttarnir hava ment seg heilt nógv.

Somuleiðis er ógreitt um Sigrid Vang fer at luttaka á Oyggjaleikunum.

### Ikki endaligt

Kappingin leygardagin var næsta úttøkukappingin hjá bogaskjúttunum, og tað vísir seg, at um Sigrid Vang velur at luttaka, so hava Føroyar 8 menn og 4 kvinnur við til Oyggjaleikirnar, og tað er tað mesta, ein oyggj hevur loyvi til at hava við.

Tó er enn ikki avgjørt júst hvørjir teir átta menninir eru, tí hørð kapping er um plássini, og serliga í compoundbólkinum er líkt til, at tað ikki verður avgjørt, hvør sleppur til Oyggjaleikir fyrr enn flaggdagin, tá seinasta úttøkukappingin.

Úttøkukappingarnar í bogaskjóting eru skipaðar á tann hátt, at eitt minsta krav er til skjúttarnar, sum teir skulu megna í minst einari kapping, og síðani verða tvær tær bestu av teimum trimum kappingunum taldar.

Samlaða stigatalið yvir tvær kappingar avgerð innanhýsis kappingina ímillum skjúttarnar, ið hava megnað oyggjaleikakravið.

Til kappingina leygardagin luttóku 19 skjúttar, og 16 av teimum megnaðu kravið, hóast tað var kalt og eitt lot á Svangaskarði í morgun.